# Børn ótu í svimjihylinum

**Fleiri dagar við góðveðri hava verið í hesi vikuni, og tað hava serliga dagstovnarnir notið gott av**

GÓÐVEÐUR
*Solby A. Eliasen*



*Vøggustovubørnini í Blákolluni eru tólv í tali, men júst hesa løtuna, meðan tey ótu, vóru tey bert ellivu, tí at tað eina lá og svav í barnavogni*

*Mynd: Jens K. Vang*

**Klaksvík:**
Ein dagin í vikuni vóru børnini í vøggustovuni í dagstovninum Blákollan útferð úti í Grøv. Tey nutu tað góða veðrið og spældu har fyrrapartin.

Tá tað leið móti døgurða, og svongdin fór at gera um seg, settust tey í øðrum av teimum gomlu svimjihyljunum at eta matpakkarnar. Tey høvdu júst sett seg, tá Sosialurin kom framvið. Og tey vóru avbera fegin at síggja okkum. Tey róptu hey og vildu beinanvegin hava at vita, hvørji vit vóru, og hvussu vit itu. Og tá myndamaðurin rópti á tey, tí hann skuldi taka mynd, róptu tey øll appelsin aftur til hansara.

Triggjar kvinnur vóru við børnunum, sum vóru tólv í tali.

– Vit hava fýra børn í part, um ein kann siga tað so, greiddi eitt av starvsfólkunum frá, meðan hon gav einum barni meira breyð við skerpikjøti uppiá. Tá veðrið er gott, er tað so ofta, at stovnar og onnur við nýta høvi til at fara ein túr við børnunum, so tey sleppa út um teirra dagliga øki á stovninum.

– Vit vóru ein annan dagin úti og grillaðu við teimum í havanum hjá einum av okkum, greiða tær frá.

Tað var sera stuttligt at síggja, hvussu fitt og still børnini sótu, meðan tey ótu. Øll tann friska luftin hevði eisini óivað givið teimum góðan matarlyst, tí tey drivu á at eta.

– Nú tá vit eru liðug at eta, gongur leiðin aftur til Blákolluna, tí nú skulu tey sova.

Og tað sást á fleiri av teimum, at tey vóru við at gerast lin, tí tey sótu og gníggjaðu sær um eyguni.



## Tøkk

Eina hjartans tøkk senda vit tykkum øllum,
ið sýndu samkenslu og á annan hátt hjálptu til,
tá okkara høgt elskaði maður, pápi, verfaðir og abbi

**Leivur Elias Joensen**
Oyri

lá sjúkur, doyði og varð jarðaður.

Ein serstøk tøkk til tykkum á B6,
ið gjørdu tað møguligt hjá okkum at vera um hann,
og fyri tað umsorgan, ið hann og vit fingu,
eisini takka vit tykkum, ið vitjaðu hann so trúliga.

Eina hjartans tøkk til læknar, heimasjúkrasystrar
og heimahjálpir, ið gjørdu tað gjørligt at vit kundu
fáa hann heim, tað síðstu tíðina.
Ein serstøk tøkk til familju og vinir,
ið komu inn á gólvið og vóru um okkum
og hjálptu til á ymiskan hátt.
Tøkk til Emil Olsen prest, fyri troystarrík orð. Takk til
sangarar og kirkjutænarar. Tøkk til tykkum øll fyri tað
stóru hjálp, ið tit veittu okkum til jarðarferðina.

Tøkk fyri blómur, kransar, peningagávu til
Føroya Felag Móti Krabbameini og aðrar heilsanir.
Tøkk til tykkum øll, ið fylgdu honum
til hansara seinasta hvíldarstað.
Hjartans tøkk øll somul.

*Kærar heilsanir*
**Knúdina, Jóannis, Anna, Sámal, Maria og Elias**

## Tøkk

Hjartans tøkk fyri sýnda samkenslu, tá kæri
maður mín, góði pápi, verpápi, abbi og langabbi
okkara

**Erik Sofus Mørkøre,**
**Klaksvík**

doyði og fór til gravar.

Takk fyri vitjanir, heilsur, gávur, blómur og
kransar. Takk til prestarnar Kjartan Mørkøre og
Niels Paula Danielsen, kirkjutænarar og sangarar.
Takk øll tit ið fylgdu honum til hansara seinasta
hvíldarstað.

*Familjunnar vegna*
**Berlina, Kristianna, Hannebeth, Jóhan,**
**Hjørdis, Erland og Birgir**

†

Tað verður kunngjørt, at kæri maður mín, pápi,
abbi og langabbi okkara

**Jóhannis Olsen**
í Sandavági

andaðist mikudagin 19. mars, 88 ára gamal.

Jarðarferðin verður úr Sandavágs kirkju
leygardagin kl. 14.00.

*Familjunnar vegna*
**Estrid og børnini**

Tey, ið vilja minnast Jóhannis, kunnu lata Missiónshúsinum í Sandavági eina gávu.

## Konsert í Ósáskúlanum útsett

Næmingar í Tónlistaskúlanum og Klaksvíkar Hornorkestur fara at hava konsert í Ósáskúlanum í dag, leygardagin. Upprunliga varð sagt, at konsertin byrjar klokkan tvey, men vegna ymsar orsøkir, so er hon útsett til klokkan fimm.

**– sae -s**

Sølufólk
til byggimarknaðin.

**Vit søknast eftir sølufólkum til byggimarknað okkara í Tórshavn at byrja sum skjótast ella sambært nærri avtalu.**

Vit vilja bjóða tær eitt starv í einum spennandi og skjóttvaksandi virkisøki innan bygging.
Tú kemur sum høvuðsøki at starvast við sølu í byggimarknaðinum, har tú eisini verður ein natúrligur partur av innkeypi sum heild.
Tú skalt saman við starvsfelagum tínum vera við til í tí støðugu menningini av handli okkara, har vit seta tænastu og góðsku í hásæti.

**Vit vænta at tú:**
- hevur kunnleika til EDV á brúkarastøði
- ert fyrikomandi og útatvend/ur
- ert nærlagd/ur og røkin
- vísir vilja at samstarva við onnur

Hevur tú áhuga í handli innan byggivinnuna, og kanst liva up til omanfyri nevndu eginleikar, kanst tú senda okkum eina umsókn saman við prógvum og ummælum.

**Umsóknin skal sendast til:**
P/F Havnar Timburhandil
Heykavegur 4
Box 3038
FO-110 Tórshavn

*Hevur tú spurningar, kanst tú seta teg í samband við Jógvan Jørgensen á tlf. 31 12 50*

TIMBUR HT HANDILIN

**Tórshavn:** Tel 31 12 50 • Fax 31 54 60 • ht@ht-tilfar.fo
**Sandur:** Tel 36 12 50 • Fax 36 11 50 • ht@ht-tilfar.fo • **Kambsdalur:** Tel 44 44 41 • Fax 44 48 41 • ht@ht-tilfar.fo
**www.timburhandilin.fo**



# Løgmaður hevur boðað frá føroysku støðuni

KRÍGGJ
*Ingi Rasmussen*

Løgmaður hevur boðað ríkisumboðnum frá, at Føroya løgting ikki stuðlar USA í álopinum á Irak. Tað gjørdi hann í brævi friggjadagin.

Løgmaður staðfestir, at øll tiltøk til tess at fáa Saddam Hussein at akta ST-samtyktir, áttu at verið samtykt í Sameindu tjóðum. Tað ger løgmaður eftir áheitan frá Føroya løgtingi, sum við stórum meirluta vildi hava ST at standa aftan fyri øll tiltøk.

Dúgliga hevur verið gitt, hvagar løgmaður fór at senda fráboðanina um løgtingsins støðu. Skuldi tað vera ST og altjóða samfelagið? Ella valdi hann ríkisrættarligu leiðina? Løgmaður valdi ríkisumboðið.

Sostatt hevur løgmaður samtundis boðað donsku stjórnini frá, at føroyingar ikki eru samdir við tann uttanríkispolitikk, sum Danmark førir vegna ríkið. Seinnapartin í gjár samtykti Fólkatingið eftir øllum at døma, at Danmark heiljhartað stuðlar álopinum á Irak.

Dygd verður skapað,
tá ið tú gert tær ómak

Nýggi køkshandilin í Tórs-kafeteria við Sjónleikarhúsið hevur altíð okkurt serligt á skránni. Kom og sigg okkara nýggju køksframsýning við dygdar-køkum, baðirúmum og hvítvarum.

METROPOL KIRS-køkur verður seldur við 10 % í avsláttri!



METROPOL KIRS -10%

BIGA
Køkar gjørdir við nærlagni

BIGA-BLAÐIÐ NÝTT
124 síður við íblástri. BIGA-BLAÐIÐ er á tremur við greinum og tilbúnum um køkar og baðirúm. Tak títt eintak í Ítuum BIGA handil ella bílegg títt á www.biga.fo

BIGA, Niels Finsens gøta 38, Tel. 32 06 66, Faks 32 06 67, biga@biga.fo, www.biga.fo

HeimaGreiðslan




**Við HeimaGreiðsluni kanst tú:** Kanna saldur · Fáa yvirlit yvir bókingar · Rinda rokningar og flyta pengar · Samskifta við kundarráðgevan · Søkja um lán.

Við farteleføn, teldu og internetsambandi kanst tú vera kring allan heim og greiða tíni sparikassaørindi tá best liggur fyri.

HeimaGreiðslan er ókeypis.

Vitja heimasíðuna www.sparikassin.fo og royn HeimaGreiðsluna.

Tú gert av hvar og nær. Við HeimaGreiðsluni
er Sparikassin opin – har og tá tú ynskir tað.

FØROYA SPARIKASSI
www.sparikassin.fo